**Partur 2 av 3 :**
***Teir republikansku demokratarnir og Harra Barack Hussein Obama***

# Tann knústi amerika




**Í hesi næstu greinini hjá mær av tilsamans trimum fari eg at greiða frá, hví eg hvørki hevði sett mín kross við eitt demokratiskt forsetavalevni ella eitt republikanskt forsetavalevni, um eg hevði havt valrætt her. Eg komi eisini inná, hví eg tó hevði valt Obama, um eg hevði verið noyddur at valt millum annan av báðum høvuðsforsetavalevnunum**

**FORSETAVAL**
*Jens Hákun G. Leo, stjórnmálafrøðilesandi, San Diego State University, San Diego - CA*

Nú tað av álvara stundar til amerikanska forsetavalið, bendir framvegis alt á, at Obama fer at vinna valið og harvið at gerast tann næsti amerikanski forsetin. Retorikkurin hjá Obama um, at nú skulu broytingar fremjast í tí amerikanska samfelagnum, sýnist eftir øllum at døma at tiltala ein meiriluta av teimum amerikumonnunum, ið fara á val, og tí er tað ógvuliga sannlíkt, at Obama fær nóg mikið av atkvøðum til at gerastnýggjuramerikanskur forseti. Spurningurin er so, hvørt Harra Barack Hussein Obama fer at hava eina broytandi ávirkan á tað amerikanska samfelagið.

Eg loyvi mær at ivast í, um Obama fer at broyta tað amerikanska samfelagið, og serliga amerikanskan uttanríkispolitikk, nakað serligt, og tað nívir mítt góða sinni, tá eg hoyri fólk, bæði her í USA og heima í Føroyum, tosa um, hvussu týdningarmikið tað er, at Obama, og endiliga ikki McCain, vinnur valið, og eisini nívir tað meg, tá fólk tosa um, hvussu gott tað fer at vera, tá Obama kemur til valdið eftir átta ræðulig ár við Bush yngra í Hvítu Húsunum. Tá fólk tosa á henda hátt, sum tey sjálvandi hava sín fólkaræðisliga rætt til at gera, so meti eg tey vera lítið vitandi um tað politiska lívið í USA og um ta politisku søguna í USA.

Fólk siga vanliga, at Bush hevur oyðilagt heimsbúskapin. Fólk siga eisini vanliga, at Bush bert hevur verið upptikin av uttanríkispolitikki og kríggi, og at hann heldur hevur raðfest at røkja áhugamálini hjá teimum heilt ríku fram um tað røkja áhugamálini hjá tí vanliga arbeiðandi borgaranum. Fólk siga eisini, at Obama fer at leggja størri dent á at hjálpa tí vanliga arbeiðandi borgaranum, og at hann fer at leggja minni dent á kríggj og uttanríkispolitikk. Nú vil eg loyva mær at spyrja meg sjálvan, um alt hetta, sum fólk vanliga siga, er rætt. Um vit fyrst tríva í Bush, so er tað skjótt at koma til ta niðurstøðuna, at Bush í ein ógvuliga stóran mun hevur verið upptikin av stríðnum/krígnum í Afghanistan og Irak, og at hann ikki hevur verið serliga áhugaður í tí vanliga arbeiðandi borgaranum, meðan hann tvørturímóti hevur verið ógvuliga áhugaður í at geva skattalættar og annað gott til tey ríku.

Hetta er ein niðurstøða, sum nógv óivað munnu vera samd um, men meðan fólk flest nýta hesa áðurnevndu niðurstøðu fyri at niðurgera Bush, so vil eg nýta hesa niðurstøðu fyri at vísa á, at Bush er ikki so ólíkur forsetum, sum hava verið frammanundan honum, og at Obama og forsetar, ið fara at verða valdir í framtíðini, neyvan fara at verða heilt ólíkir Bush. Tí fyrst av øllum, so kann man spyrja seg sjálvan, hvat Obama hevði gjørt, um hann var forseti eftir yvirgangin tann 11.september.

### Hvat hevði Obama gjørt, um hann var forseti tann 11.september ?

Sum tann eini av okkara undirvísarum her í San Diego eisini hevur víst á, so hata amerikumenn, bæði demokratar og republikanarir, at vera álopnir, og serliga hata amerikumenn at vera álopnir á ein slíkan hátt, sum teir vóru tann 11.september. Tískil er tað mín meting, at líkamikið hvør so var forseti tann 11.september, um tað so var demokraturin Obama, ella um tað var demokraturin Roosevelt, so hevði viðkomandi amerikanski forsetin til eina og hvørja tíð verið noyddur at savna tjóðina til tess at hevna eitt slíkt yvirgangsálop sum tað tann 11.september. Amerikumenn eru jú ein stolt tjóð, og tá teir verða særdir á ein slíkan óvæntaðan hátt, sum teir vóru tann ræðuliga týsmorgunin tann 11.september 2001, so vænta teir, at sitandi forsetin, líkamikið um hann er demokratur ella republikanari, vil hevna teir yvirgangsmenn, sum hava gjørt seg inná teir. Tað er jú tann amerikanski forsetin, sum í eini slíkari støðu sum henni eftir tann 11.september hevur vald til at hevna yvirgangsmennirnar vegna tað amerikanska fólkið, sum hann skal eitast at tæna, og eftirsum at tað amerikanska fólkið hevur vald til ikki at velja ein forseta aftur til eitt seinna valskeið, sum støðan var við Bush í 2001, tá ið hann sat í sínum fyrra valskeiði, so vildi tað verið fjákut av einum og hvørjum amerikonskum forseta ikki at eftirlíka ynskinum hjá amerikumonnum um at fáa hevnd, tí hetta hevði kunnað merkt tað, at møguleikarnir hjá honum til at verið afturvaldur, høvdu minkað.

Tí vil eg pástanda, at Obama eisini, eins og Bush, hevði lopið á Afghanistan, tí amerikanska tjóðin varð særd og vildi hava hevnd og fyri ikki at skaða møguleikarnar fyri at verða afturvaldur, so hevði Obama lopið á Afghanstan, eins og Bush gjørdi tað í oktober 2001. Onkur kann nú siga, at eg kann sjálvandi ikki vita, um Obama hevði lopið á Afghanistan, um hann var amerikanskur forseti í 2001, og tað er fyri sovítt eisini rætt. Tað er bara nakað, eg pástandi, at hann hevði gjørt. Men Bush leyp á Afghanistan fyri millum annað at fáa hevnd fyri 11. september vegna tað amerikanska fólkið, og demokraturin Roosevelt lýsti fyrst í fýratiárunum kríggj móti Japan til tess at hevna álopið á Pearl Harbour, og hetta eru so tvey dømi um, at tá USA verður álopið, so vil sitandi forsetin, líkamikið um hann er demokratur ella republikanari, hevna álop á amerikonsku tjóðina, og við hesum vil eg siga, at søgan hevur lært okkum, at amerikanskir forsetar, demokratar ella republikanarar, í slíkum støðum sum 11.september altíð fara at søkja hevnd, og eg meti ikki, at Obama er nakað undantak í hesum føri.

### Obama vil hava fleiri hermenn í Afghanistan

Onkur vil nú halda, at tað gott nokk var rætt av Bush at leypa á Afghansistan, men at hann hevur havt hermenn í Afghanistan í ov langa tíð fyri at fremja fólkaræði í Afghanistan. Her kann vísast á, at Bush als ikki er nakað verri enn Obama, tí Obama vil flyta enn fleiri hermenn til Afghanistan. Eisini kann eingin koma og siga, at hann velur demokratarnar, tí at einasta reella alternativið til demokratarnar, republikanararnir, dáma ov væl at vera í fjarskotnum londun sum t. d. Irak og Afghanistan. Tað vóru jú nettupp demokratarnir við Kennedy og Johnson á odda, ið vóru við til at økja um amerikonsku hermegina í Vietnam - ein gerð ið fekk vanlukkuligar fylgjur fyri bæði USA og Vietnam. So kann onkur koma og siga, at tíðin við Kennedy og Johnson hoyrir til fortíðina og til tað kalda kríggið, og at man sjálvandi ikki skal halda seg aftur við at velja Obama orsakað av hvat floksfelagir hansara hava gjørt fyri fýrati til fimmti árum síðani. Hetta er óivað rætt, men hygg hvat Obama sigur um Afghanistan. USA skal flyta fleiri hermenn til Afghanistan !!! Við hesum royni eg at vísa á, at tá fólk siga republikanararnar vera óðar eftir at sleppa í kríggj, so er tað óivað nakað um tað, men tað merkir ikki, at demokratarnir hava verið nakað hakk frægari millum ár og dag, og tað koma teir neyvan at vera í framtíðini, tí søgan hevur jú lyndi til at endurtaka seg.

### Tey deyðu gloymdu uttanríkispolitisku líkini hjá demokratunum

Vit skulu í høvuðsheitum hyggja at teimum vánaligu avgerðunum hjá demokratunum, síðan fólk flest í Norðanlondum sýnast at hava so øgiligt sympati fyri demokratunum. Fyrst av øllum kunnu vit spyrja okkum sjálvi, hvør forseti drap eitt ótal av japanesarum uppá tríggjar dagar við tí mest hættisliga vápninum av øllum - atombombuni.